# Lærararnir mugu fáast aftur í skúlan

**Tað er ov stórur partur av teimum, sum taka læraraútbúgving, sum fara í starv uttan fyri skúlan. Tað má broytast, sigur nýggi formaðurin í Føroya Lærarafelag**

FORMANSVAL
*Edvard Joensen*



*Nýggi formaðurin í Føroya Lærarafelag eitur Johannes Eli Iversen. Hann er 55 ára gamal og útbúgvin lærari í 1972. Hevur síðan starvast við Tórshavnar Kommunuskúla*
*Mynd : Jens Kristian Vang*

Nývaldi formaðurin í Føroya Lærarafelag, Johannes Eli Iversen, ætlar sær at arbeiða fyri, at tey, sum taka læraraútbúgving, eisini fara at brúka hana innan skúlagátt. Tað er ikki nóg gott, at partur av útbúnu lærarunum fer í starv aðrastaðni enn í skúlanum, heldur hann.

Tað kann tykjast, sum at tað ikki er nóg áhugavert hjá teimum, sum fáa sær læraraútbugving, at koma í starv í skúlanum, sigur Johannes Eli Iversen, sum um vikuskiftið varð valdur til formann í Føroya Lærarafelag. Hann heldur ikki, at tann gongdin kann halda fram, og sigur, at hetta verður eitt av stórmálunum, sum Føroya Lærarafelag í framtíðini eigur at arbeiða við.

Og tá hann sigur eitt av málunum, er tað tí, at tað eftir hansara tykki eru fleiri stórmál at loysa hjá nevndini í Føroya Lærarafelag.

Eitt annað mál, arbeiðast má við, er at halda saman upp á bólkarnar í felagnum, sigur nýggi læraraformaðurin.

Hann vísir á, at tað eru fleiri ymsir bólkar í felagnum, og øll áhugamálini hjá limum felagsins passa ikki altíð saman. Eitt nú hevur felagið sáttmálasettar lærarar, tænastumenn og stjórar, sum hvør sær hava ymisk áhugamál, og kortini eru ein felags flokkur, sum er limur í Føroya Lærarafelag.

Nýggi formaðurin sær tað sum eina stóra uppgávu at halda hesum bólkum saman í felagnum og vinna teimum sum bestar felags sømdir.

Eitt nú kann tað koma fyri, sigur hann, at viðurskiftini hjá sáttmálasettum lærarum ikki altíð eru tey somu. Tað heldur hann ikki vera nøktandi, sigur Johannes Eli Iversen.

### Strævnar lærugreinar

Nýggi formaðurin í Føroya Lærarafelag heldur ikki, at allar lærugreinar í fólkaskúlanum fáa tær sømdir, teimum eigur at verða givnar. Eitt nú vísir hann á, at lærugreinin alis- og evnafrøði ikki hevur tað nakað serligt í føroyska skúlanum.

– Talan er um eina strævna lærugrein, sigur Johannes Eli Iversen. Næmingatalið í flokkunum er høgt, og tað sama er meðalaldurin á teimum lærarum, sum undirvísa í lærugreinini, vísir hann á.

Næmingatalið liggur um einar 22-24, og lærararnir, sum undirvísa í hesi lærugreinini, eru eldri fólk. Sum dømi nevnir hann, at við Tórshavnar Kommunuskúla er yngsti lærarin, sum undirvísir í alis- og evnafrøði, 54 ár.

– Lærugreinin er krevjandi, og tað er einki yvir at dylja, at tað eru ikki øll, sum makta hetta, sigur Johannes Eli Iversen. Tað kann so aftur vera viðvirkandi til, at yngri lærarar beinleiðis sleppa sær undan at taka slíkar lærugreinar.

Høvdu flokkarnir kunnað verið upp á eitt nú einar 15 næmingar, var tað líkasum lættari at yvirskoða. Tí talan er ikki um eina lærugrein, har lærarin stendur framman fyri talvuni við kriti. Nei, her skal alt ganga fyri seg við royndum. Og tað er ikki bara sum at siga tað við so nógvum næmingum, vísir nýggi læraraformaðurin á.

### Arbeiðstíðin

Eitt annað stórmál, nýggja leiðslan í Føroya Lærarafelag hevur liggjandi fyri framman, er arbeiðstíðin hjá lærarunum.

Tað, sum sæst aftur av arbeiðinum hjá einum lærara, er vanliga undirvísingartíðin, sigur Johannes Eli Iversen. Men har verður sjálvandi arbeitt nakað væl meira enn tað, vísir hann á.

Í løtuni liggur eitt uppkot um arbeiðstíðir hjá lærarunum úti hjá limunum í Føroya Lærarafelag til uratkvøðu, sigur nývaldi formaðurin. Talan er um uppskot frá Mentmálaráðnum, og mangt bendir á, sigur hann, at Mentamálaráðið fer at seta tað í gildi 1. august, óansæð hvat limir Føroya Lærarafelags halda um tað.

Uppskotið líkist tí, sum galdandi er í Danmark, sigur hann. Har verður alt, sum lærarar gera í samband við skúlan, gjørt um til arbeiðstíð. Tað verið seg foreldrafundir, fyrireikingar av ymsum slagi, og hvat tað nú kann vera. Arbeiðstíðin er sett til 1.800 tímar árliga.

### Nýggi formaðurin

Nýggi formaðurin í Føroya Lærarafelag eitur Johannes Eli Iversen. Hann er 55 ára gamal kvívíkingur, sum er búsitandi í Hoyvík.

Johannes Eli Iversen tók lærarprógv á Føroya Læraraskúla í 1972 og fór beinanveg í starv við Tórshavnar Kommunuskúla, har hann hevur verið síðan.

Hann er í dag annar av tveimum varaskúlastjórum við Tórshavnar Kommunuskúla.

Samstundis sum hann hevur undirvíst Kommunuskúlanæmingum, var hann eisini í sjey ár ráðgevi í alis- og evnafrøði hjá Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð.

Nú hann er vorðin formaður í Føroya Lærarafelag, fer hann at biða um farloyvi frá starvi sínum við Tórshavnar Kommunuskúla.

Johannes Eli Iversen varð valdur formaður í Føroya Lærarafelag eftir Elsu Birgittu Petersen, sum leggur frá sær. Hon fer í nýtt starv sum fyrstilærari í Hvalba. Nýggi formaðurin tekur við starvinum tann 10 mei.

Føroya Lærarafelag hevur aðalfund á hvørjum ári, men nevndarval er bara annaðhvørt ár.



*Elsa Birgitta Petersen letur formanssessin í Føroya Lærarafelag víðari til Johannes Eli Iversen. Elsa Birgitta Petersen fer eftir summarfrítíðina í starv sum fyrstilærari við Hvalbiar skúla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Manskórið á 3. plássi í kapping í Cornwall

**Á sangkapping í Cornwall í Suðuronglandi endaði Tórshavnar Manskór á triða plássi av 12. – Hetta eru vit sera fegnir um og ernir av, sigur Stein Fossá, formaður kórinum**

KÓRKAPPING
*Eirikur Lindenskov*



*Tórshavnar Manskór endaði á triða plássi í sangkappingini á manskórfestivalinum í Cornwell um vikuskifti*

Um vikuskiftið var stórur manskórfestivalur í Cornwall í Suðuronglandi, har 47 kór úr øllum Evropa við 2.000 sangarum syngja á ymsum konsertum. Á festivalinum er eisini sangkapping, býtt sundur á kór við færri enn 40 sangarum og kór við fleiri 40 sangarum.

Tórshavnar Manskór var í bólkinum við kórum við færri enn 40 sangarum, og kórið endaði á triða plássi við 87 stigum. Í hesi kappingini vóru 12 kór. Tað var eitt kór úr Estlandi, sum vann kappingina við 95 stigum.

– Teir vóru ungir, í miðal 22 ár, og teir sungu sera væl, sigur Stein Fossá, formaður í kórinum.

Annað plássið vann eitt kór úr Slovenia við 90 stigum, meðan Tórshavnar Manskór á triða plássi fekk 87 stig.

– Hetta er fyrsti bretski manskórfestivalurin, sigur Stein Fossá, sum sigur, at tað hevur veirð sera spennandi.

– Vit vita ikki, hvussu vit liggja fyri, tí vit hava einki at samanbera okkum við. Tí var tað serliga spennandi, tá stig vórðu givin, tí vit ánaðu ikki, hvar vit endaðu. Men tá úrslitið var greitt, vóru vit sera fegnir, sigur Stein Fossá.

Tórshavnar Manskór sang tríggjar sangir: »Stemning«, »Vit eru føroyingar« hjá Kára Bæk og Regin Dahl og teir endaðu við Kingosálminum, »Jeg vil min Herre love«.

Veðrið er einki serlig í Cornwall í dag.

– Her er vindur og regn. Helmingurin av okkum býr í kampingvognum meðan hin helmingurin býr í tjaldum. Í nátt fór eitt tjald á flog, men her stendur væl til og vit hava tað allir gott, sigur Stein Fossá, tá Sosialurin hitti hann fyri løtu síðani.

Tórshavnar Manskór kemur aftur til Føroya mikudagin.

# 13,5% færri persónbilar

**Afturgongd er í innflutninginum av bilum bæði í mars og apríl mánaði í ár í mun til í fjør, vísa hagtøl frá Bileftirlitinum**

BILASØLA
*Eirikur Lindenskov*



*Sambært hagtølunum hjá Bileftirlitinum, so verða ikki eins nógvir nýggir persónbilar at síggja í gøtunum, sum higartil*

Tað sær út sum, at persónbilasølan í Føroyum er í afturgongd. Sambært hagtølum frá Bileftirlitinum sæst, at eisini í apríl er innflutningurin minkaður í mun til sama mánað í fjør.

Í apríl mánaði í ár vóru seldir 117 persónbilar móti 155 í fjør. Hetta er ein munur upp á 38 bilar ella umleið 25%.

Í mars í ár vóru seldir 115 bilar móti 132 sama mánað í fjør. Tað er ein munur upp á 17 bilar ella umleið 13%.

Samlaði innflutningurin av persónbilum fyrstu fýra mánaðirnar í ár í mun til fyrstu fýra mánaðirnar í fjør er lækkaður við 13,52%.

Persónbilar fylla sum vera man mest í hagtølunum hjá Bileftirlitinum, men tey vísa eisini eitt nú, at talið av vørubilum í sama tíðarskeiðið er minkað 7,14%, meðan samlaða afturgongdin í bilainnflutninginum er -12,03%.

Fyrstu fýra mánaðirnar í ár eru skrásett 46 prutl.

# Vit halda okkum til sáttmálan

Maskinmeistarafelagið hevur ikki stórvegis viðmerkingar, nú Karsten Hansen ikki vil góðkenna sáttmálan, sum SEV hevur gjørt við maskinmeistarafelagið.

Jógvan Nybo, formaður í maskinmeistarafelagnum, sigur, at felagið hevur onga fráboðan fingið um, at sáttmálin ikki verður góðtikin.

Hann sigur, at felagið hevur gjørt ein sáttmála, og honum hava maskinmeistararnir hjá SEV fingið løn eftir í tveir mánaðir.

–Vit ganga eisini út frá, at avtalan, vit hava gjørt, verður hildin, sigur hann í stuttari viðmerking.

Spurdur um tað er hugsandi, at maskinmeistarafelagið fer at samráðast um sáttnála einaferð afturat, sigur Jógvan Nybo, at tað fær hann onki sagt um og tað tekur felagið ikki støðu til, fyrrenn fráboðan kemur um, at sáttmálin ikki verður góðkendur.

# Karsten Hansen sleppur ikki so lætt

**Arbeiðarafeløgini fara at svara Karsten Hansen aftur, nú hann ikki vil góðkenna sáttmálan hjá maskinmeistarunum hjá SEV tí tað er bara fyri at gera okkum fortreð, sigur Ingeborg Vinther**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Tað, sum Karsten Hansen hevur sagt er bara fyri at gera arbeiðarafeløgunum fortreð, men vit fara at svara honum aftur, sigur Ingeborg Vinther*

– Hetta er ein níðingsgerð ímóti arbeiðarafeløgunum.

IngeborgVinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, hevur tikið tað tað rættiliga illa upp, at Karsten Hansen nú noktar at góðkenna sáttmálan, sum herfyri varð gjørdur ímillum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Ingeborg Vinther sigur, at arbeiðarafeløgini hava ikki enn havt stundir at kanna málið.

Men tað, sum Karsten Hansen hevur ført fram, skal ikki sleppa at fara afturvið boðinum óátalað og tí fara arbeiðarafeløgini at viðgera støðuna og so fara tey at svara landsstýrismanninum aftur.

Tey fara at geva honum greitt svar uppá fráboðanina um, at hann ikki vil góðkenna sáttmálan við maskinmeistararnar ha SEV.

Men tey fara eisini at geva honum greitt svar uppá tað, hann førir fram um, at skattalættin, sum er settur í verk, eigur at føra til lagaligari lønarkrøv.

### Bara fyri at gera fortreð

Sáttmálin gevur maskinmeistarunum hjá SEV góð 10% í lønarhækking tey bæði næstu árini og tað heldur Karsten Hansen er ov mikið.

Hann heldur, at skattalættin eigur at føra til lægri lønarkrøv og tí skal lønarhækkingin verða minni enn so, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

–Hetta er bara fyri at gera arbeiðarafeløgunum fortreð, nú okkara samráðingar við arbeiðsgevararnar eru, sigur Ingeborg Vinther. Hon spyr, hvussu tað ber til at Karsten Hansen ikki kemur við fráboðani um, at hann ikki vil góðkenna sáttmálan við maskinmeistararnar hjá SEV, fyrrenn nú arbeiðarafeløgini hava lagt síni krøv fram, hóast sáttmálin hjá SEV hevur verið í gildið í tveir mánaðir.

– Hetta verður ikki góðtikið tí tað er bara gjørt at órógva okkara samráðingar, sigur hon.

Og hon ger samstundis púra greitt, at hetta fer ikki á nakran hátt at ávirka lønarkrøvini hjá arbeiðarafeløgunum tað allarminsta, at landsstýrismaðurin nú ætlar at kolldøma sáttmálan hjá maskinmeistarafelagnum.

– Krøvini eru sett fram og tey eru tey somu, sigur Ingeborg Vinther.

Hon heldur, at tað er nógv fyri, at Karsten Hansen nú kemur sum ketta upp úr høvdatrogi og órogvar samráðingarnar sum eru.

– Skattalættin gevur ikki nær í námind av tí, sum landsstýrismaðurin førir fram. Samstundis eru tað tær hægru lønirnar, sum fáa tann størsta skattalættan, og tað fara vit at vísa á í okkara aftursvari til Karsten Hansen, sigur Ingeborg Vinther.

Samstundis hava tinglimir hesi bæði seinastu árini fingið eina lønarhækking upp á næstan 2700 krónur um mánaðin, umframt at viðbótin er hækkað.

Harafturat fáa teir 2.000 um mánaðin skattafrítt til ymsar útreiðslur, umframt endurgjald fyri at ferðast av bygd til Havnar og tað er heilt upp í 90.000 skattafrítt um árið, alt eftir, hvar í landinum, tinglimurin býr.

– Hvussu kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum áleggja arbeiðsfólki at halda aftur í lønarkrøvunum, samstundis sum hansara egnu løgtingslimir fáa so stóra lønarhækking og allar aðrar sømdir, sum her er talan um, spyr IngeborgVinther.